

**TIPS** FRÁ EYDNU

eydna@sosialurin.fo

# Hvat siga litirnir um teg?

**2011** VERÐUR ÁRIÐ, HAR **ALT** AV ÁLVARA **ER LOYVT**. VIT SÍGGJA **STERKARI** LITIR, ENN VIT HAVA **SÆÐ LEINGI**, SAMSTUNDIS, SUM BÆÐI **HVÍTT** OG **SVART** EISINI ERU **TOPPMODERNAÐ**. MEN HVØRJI **TEKIN** SENDIR TÚ VIÐ TEIMUM **LITUNUM**, TÚ LETUR TEG Í?

### Hvítt
Sendir tekin um reinleika og tað hátthevjaða. Hvítt er liturin, sum í størstan mun gevur virðing. Í vesturheiminum er tað litur reinleikans, men í fjareystri er tað liturin fyri sorg. Hvítt kann setast saman við øllum litum, og letur tú teg í hvítt, er tað víst, at tú verður sædd.

### Reytt
Sendir tekin um sterkar kenslur. Reytt sendir tey sterkastu boðini av øllum litunum. Reytt verður oftast tvinnað saman við kærleika, men kann eisini merkja gleði. Liturin er bestur, um hann ikki verður settur saman við øðrum litum, tí á tann hátt kemur boðskapurin klárast fram. Reytt kann tó setast saman við svørtum fyri at fáa ein greiðan seksuellan undirtóna.

### Svart
Sendir tekin um fjarstøðu og vænleika. Inntil 1930'ini varð svart einans nýtt til sorg, men tað megnaði Coco Chanel at broyta. Í dag er svart tann mest nýtti mótaliturin. Svart gevur virðing - men einans um tú hevur nóg stóran reystleika at bera henda stolta litin.

### Jørðlitir
Senda tekin um nøring, hvíld og trivnað. Brúnt leiðir tankarnar til hita og alt tað, sum er livandi. Til at lýsa ymsu jørðlitirnar verða ofta nýtt heiti úr náttúruni. Liturin er elegantur og róligur, serliga um tað ikki er brúnt við ov nógvum gulum undirtónum. Letur tú vera við at seta jørðlitir saman við skríggjandi litum, klæða brúnir litir teimum flestu.

### Violett
Sendir tekin um tað kensluborna og tað ókenda. Violett er tann djúpasti liturin á litkringinum, og liturin leiðir tankarnar til tað andaliga og upphevjaða. Violett kann við fyrimuni setast saman við grønum og gulum litum, fyri at skapa ungdómsligan frískleika.

### Blátt
Sendir tekin um álvara og ábyrgdarkenslu. Tað er litur himmalsins og gevur eina kenslu av ró, tryggleika, tí til næstan alt, men tú skalt kanska vara teg fyri at seta blátt saman við gulum. Tað kann tykjast áleypandi.

### Grønt
Sendir tekin um javnvág og endurnýggjan. Grønt er liturin á tí unga og óspilta, sum leiðir tankarnar til várið. Tí geva grøn klæði ofta eina kenslu av frískleika. Ansa eftir at blanda gult og blátt við grønum.



Forsíðan á Elle januar 2011



Gucci vár/summar 2011

Zac Posen Vár /Summar 2011

Yves Saint Laurent vár/summar 2011

Tracy Reese vár/summar 2011

Gucci vár/summar 2011



Chanel vár/summar 2011